## ... um Anju Andersen

Anja er framúr. Hon er besti tekniski hondbóltsleikari í søguni, hjá bæði monnum og kvinnum. Tað var keðiligt, at hon mátti gevast alt ov tíðliga orsaka av hjartanum. Sinnarlagið kundi verið frægari. Men hon var fitt ímóti okkum í Slagelse. Eg síggi veruliga upp til hana.



## ... um Challenge Trophy

Kappingin er bæði ring og góð. Dystir ímóti Italia, Finnlandi og Bosnia við góðari mótstøðu geva meining. Men at vinna 81-1 á Albania er meiningsleyst. Tó kunnu mótstøðulið í undankappingum, sum Danmark ella Noregi verða ov sterk. Eitt millumting má verða best.



*- Vit hava ein møguleika ímóti Stjørnuni. Men tað krevur, at vit allar hava ein góðan dag, og at tær í Stjørnuni hava ein minni góðan dag, sigur Jacklin Durhuus*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

góvu hollendsku meistaraliðnum góða mótstøðu.

- Ein kann siga, at Evropa Cup er ein avbjóðing, sum manglar. Men hinvegin so krevur tað, at ein venur nógv um summarið, og at liðið toppar í august. Ein slík avbjóðing krevur eisini nógvar menniskjaligar og fíggjarligar ressursir. Nógv bingo og nógvir lutaseðlir skulu til. Í hondbólti er tað ikki, sum í fótbólti, at tú ert tryggjaður ein fíggjarligan minstavinning í samband við Evropa Cup-luttøku.

### Lærurík tíð í Slagelse

Frá august til desember í 2000 vóru Katrin á Neystabø og Jacklin niðri í Slagelse. Hesa tíðina vandu og leiktu tær við Slagelse, sum tá hevði sett legendarisku Anju Andersen í starv, sum venjara. Talan bleiv um eina ótrúliga strævna og lærurika tíð, hóast Jacklin ikki fekk nógva spælitíð á besta liðnum hjá Slagelse.

- Vit vandu fýra ferðir um vikuna. Vit vandu 2 tímar í høll, og so ein tíma styrkisvenjing. Umframt, at vit súkklaðu til og frá venjing. Tað var ein ótrúlig avbjóðing. Allir hinar vóru betri, og tí mátti ein geva 120% fyri at kunna fylgja við venjingunum.

Katrin hevði ikki mót uppá meira, og Jacklin tímdi ikki at verða einsamallur føroyingur, og tí settu báðar nøsina heim aftur. Eina stóra uppliving ríkari. Jacklin saknar, at landsliðsarbeiðið hjá kvinnunum er regluligari.

- Tað blívur ov langt ímillum uppgávurnar. Tað er alt ov ofta, at landsliðsleikarnir mugu byrja alt av nýggjum, tá tað blívur ov langt ímillum uppgávurnar. Men nú hevur HSF lovað eitt meiri regluligt landsliðsarbeiðið. Men sjálvandi, tað krevur nógvan pening.

Jacklin hevur upplivað nógv, sum hondbóltsleikari, og vónar at gerast enn eina stóra uppliving ríkari í morgin. Tað hevur nógv at siga fyri vestmenningar at vinna í hondbólti. Eisini um ein leikar fyri Kyndil!